# Ítróttarblaðið

**Ítróttartoymið á Sosialinum:**







Hilmar Jan Hansen einslistir@email.fo
Uni Holm Johannesen uni@sosialurin.fo
Tróndur Arge trondur@sosialurin.fo
Heri Simonsen heris@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo



## Gunnar framvegis skaddur

Gunnar Nielsen er við Tranmere Rovers, sum í dag er á vitjan hjá Dagenham í League One. Gunnar hevur verið skaddur í eina tíð, men væntandi verður hann tøkur til landsliðið. Tað í landsdystinum í Estlandi, at Gunnar gjørdist skaddur. Hann hevur síðani ikki spælt við, tá Tranmere Rovers hevur spælt og tað verður hann heldur ikki í dag. Talan er um eina fibur, men væntandi veður Gunnar tøkur til báðar landsliðuppágvurnar. Landsliðið skal í næstum spæla ímóti Serbia í Føroyum og ímóti Italia í Firenze.

Rógvi Jacobsen:

# »Súrt at standa

**FÓTBÓLTUR Rógvi Jacobsen hevur síðani 2008 ikki kunna spælt við fullari megi og fær hann ikki góð tíðindi frá læknanum komandi tíðina, so er væl møguligt, at toppskorarin á føroyska landsliðnum hevur spælt sín seinasta fótbóltsdyst**

Tróndur Arge

– Hjálpir viðgerðin ikki, og skaðin ikki kann lekjast, so havi eg einki annað val enn at gevast, sigur Rógvi Jacobsen, sum í seinastuni hevur verið í Írlandi og fingið viðgerð fyri skaðan, ið hevur hildið honum uttanfyri í longri tíð.

er framvegis tað seinasta, ið hann hevur skotið. Síðani 2008 hevur hann verið plágaður nógv av skaðum, men nú er ein avklároing á veg.

– Eg havi verið til viðgerð í Írlandi og havi millum annað fingið tríggjar sproytur, sum gjarna skulu hjálpa upp á skaðan. Tað er ein vanligur skaði í fótbóltsheiminum,





» Eg havi ringt við at góðtaka, at eg ikki kann spæla

» Hjálpir viðgerðin ikki, og skaðin ikki kann lekjast, so havi eg einki annað val enn at gevast

Í 2007 skoraði hann ímóti heimsmeistarunum á teirra egna heimavølli og legði seg ovast á toppskoraralistan á føroyska landsliðnum við 10 málum. Men málið

sum eg havi fingið, og útlitini eru góð fyri, at eg komi fyri meg, siga læknarnir. Men riggar einki, so havi eg also ongan annan møguleika at gevast, sigur Rógvi Jacobsen.

**Marran byrjar í Klaksvík**

Tað var í 2008, tá Rógvi Jacobsen kom heim úr Norra at spæla við KÍ, at skaðarnir byrjaðu at gera um seg. Rógvi hevði tá roynt seg í norska IL Hødd, sum hevði fingið eyga á klaksvíksinginum eftir málini ímóti Italia.

– Eg skifti frá grasi til graslíki, tá eg kom aftur úr Norra, og tá byrjaði skaðarnir at koma. Eg spældi frá 1996 til 2008 uttan at missa ein dyst vegna skaða, so eg havi verið heppin upp á tann mátan, men í Klaksvík gekk galið, sigur Rógvi Jacobsen.

KÍ var í 2008 í niðurflytingarvanda, og Rógvi bleiv keyptur heim at tryggja plássið í bestu deildini. Rógvi spældi níggju dystir og skoraði trý mál, samstundis sum tað eydnaðist KÍ at bjarga lívinum í bestu deildini.

– Sjálvt um eg var skaddur, so spældi eg tað, eg kundi, men tað